

Skeið í reingerð
21 – 23 aug., 11 sep. og 18 sep.
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við reingerðarevnum, tólum og amboðum, umhvørvi og ergonomi. Mátingar og royndir verða gjørdar av ymiskum evnum, tilfari og amboðum. Í uppgávum verða útrokningar gjørdar, sum skulu vísa, um tað verkliga besta eisini er tað fíggjarliga besta.
Skeiðsleiðari: Kristianna Rein
Tilmelding innan 7 aug.

Buffét
Skeið 1: 18. – 22. sep.,
Skeið 2: 25. – 29. sep.
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við at tilrættaleggja og at matgera til buffét'ir. Skeiðið er skipað soleiðis, at maturin, ið verður gjørdur á skeiðnum, verður serveraður fyri gestum. Skeiðsluttakarin fær innlit í reinførisviðurskiftir í einum stórkøki og ein varhuga av arbeiðsumhvørvinum í einum stórkøki.
Skeiðsleiðari: Martin Restorff
Tilmelding innan:
Skeið 1: 4 sep.
Skeið 2: 11 sep.

Steinseting
16. – 20. okt.
Á skeiðnum verður arbeitt við tekningum, góðskuni av arbeiðnum og undirlagið. Arbeitt verður eisini við eini praktiskari steinsetingruppgávu, ið verður eftirmett eftir DS 1136.
Skeiðsleiðari: John Hvass
Tilmelding innan 2 okt.

AutoCad innleiðsla
19. – 20. okt.
Skeiðið er ætlað teimum, ið ikki eru von við at arbeiða við teldu. Á skeiðnum verður arbeitt við mús og knappaborði. Lært verður at starta forritið og at byrja eina nýggja tekning, um brúkaraflatuna, amboðs- og kommandolinjur og at skriva kommandoðir. Arbeitt verður við, at tekna einklar uppgávur.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 2 okt.

AutoCad grundskeið
26. – 27. og 30. – 31. okt.
Lært verður um funkurnar á 2D støði og tilrætta-legging av tekniuppgávum.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 6. okt.

Beton armering
30. okt. – 3. nov.
Undirvíst verður í grundleggjandi vitan um eginleikarnar á jarnbetongi, trekk og trýstviðurskiftir, ymisk sløg av armeringum, krøvum til bukkidiametur, betongløgum, stødlongdum og ankring. Arbeitt verður við at tilevna og seta vanliga armering eftir tekning.
Skeiðsleiðari: Heðin Gásadal
Tilmelding innan 16. okt.

Innleiðsla í sveising
6. – 17. nov.
Skeiðslutakarin arbeiðir við einføldum sveisistøðum við elektrodu, gass-, TIG, MIG/MAG-sveisiháttunum. Endamálið við skeiðnum er at læra á grundleggjandi støði um sveising, sveisiteori, umhvørvi og trygd og nýtslu av tólum og amboðum.
Skeiðsleiðari: Jeffri Olsen
Tilmelding innan 23 okt.

Make Up skeið
Skeiðið er skipað yvir 8 kvøld, mána- týs- miku- og hóskvøld frá kl. 19 til 22 í døgunum 5. til 15 feb.
Evnini á skeiðnum verða: húðanalysa, andlitsformar, litlæra, dag make-up, kvøld make-up, brúðar make-up og "smokey eyes"
Skeiðsleiðarar: Sunneva Thorsteinsson og Unn Zachariassen
Tilmelding innan 22 jan.

www.skeidsdepilin.fo
tilmelding á heimasíðuni
ella á telefon 318 813

120 lærarar úr 18 londum savnast í Føroyum

Heðin Samuelsen greiddi frá teimum praktisku viðurskiftunum, og Jóannes Eidesgaard setti ráðstevnuna í morgun

Í hesum døgum eru 120 luttakar úr 18 londum savnaðir til eina stóra altjóða ráðstevnu í Føroyum. International Society for Business Education eitur felagsskapurin aftanfyri ráðstevnuna, sum løgmaður setti í dag, og er tað í høvuðsheitum ein felagsskapur fyri handilsskúlalærarar

RÁÐSTEVNA

Orð & myndir
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Tað var løgmaður, Jóannes Eidesgaard, sum setti 78th SIEC / ISBE International Conference uppi í Norður–landahúsinum. Talan er um eina ráðstevnu fyri handilsskúla lærarar kring allan knøttin, sum nú um dagarnar eru savnaðir í Føroyum.

Jòannes Eidesgaard samanbar ráðstevnuna í dag við Visjón 2015. Tí á ráð–stevnuni í dag eru lærarar allastaðni frá savnaðir fyri at kjakast og tosa saman, við tí fyri eyga at fáa eina betri útbúgving. Sambært løg–manni er Visjón 2015 ikki ólík í so máta, at politiski myndugleikin hevur sett sær nøkur felags–mál og síðani er farin at viðgera og kjakast um, hvussu vit røkka hesum málum.

- Útbúgving er eisini ein av hornasteinunum í visjónunum, og tit eru væl–afturkomin aftur í 2015 at síggja, hvussu tað nú hevur gingið hjá okkum, segði løgmaður millum annað í setanarrøðu síni.

Forelskað í Føroyum

Forsetin í ISBE, Peg Saragina, var næst á røðarapallinum og eitt tað fyrsta hon segði var, at hon var vorðin forelskað í Før–oyum.

- I'm so in love with this country, segði hon og gleddi seg til at uppliva oyggjarnar næstu dagarnar. Umframt fimm fyrilestrar, workshops og aðrar fak–ligar avbjóðingar, skulu lærararnir sjálvandi eisini út at síggja Føroyar.

- Tað fakliga er eitt, men tit mugu ikki undirmeta týdningin av tí sosiala. Tí fari eg at heita á tykkum um at práta við fólk, so nógv sum gjørligt, tá vit eru á ymsu túrunum, tí tey bondini tit knýta her kunnu vísa seg at vera sera virðismikil, segði Peg Saragina, sum er forsetin í ISBE.

Aftan á fyrilestrarnar í dag, sum vóru tríggir í tali, skuldu luttakararnir ganga ein túr í býnum. Í morgin eru tveir fyrilestrar aftrat, og tað sum síðani er eftir at tí fakliga eru fleiri workshops og námsskeið. Annars skulu dagarnar her brúkast til at uppliva oyggjarnar. Luttakararnir fara avstað aftur aftan á ólavsøku.

Meiri um ráðstevnuna ke–mur í blaðnum í morgin, tá ein samrøða við forsetan í ISBE, Peg Saragina, verður við.

FAKTA

120 luttakarar úr hesum 18 londunum luttaka á ráðstevnuni í Føroyum:

- **Føroyar**
- **Hetland**
- **Ísland**
- **Svøríki**
- **Noreg**
- **Danmark**
- **Finnland**
- **Skotland**
- **Ongland**
- **Belgia**
- **Týskland**
- **Korea**
- **Eysturríki**
- **Italia**
- **Póland**
- **USA**
- **Kekkia**
- **Sveits**